VIÐMERKINGAR

# Hvat velja vit?

**Eyðbjørn Jakobsen og Jóhan Carl Dam**





**Viðmerking til Jóanes Nielsen (Fregnir 24.-30.jan 2003, síða 9)**

Tað er altíð hugvekjandi og spennandi at lesa hugleiðingar Jóanesar um viðurskifti, ið frammi eru, og at hann av sínum áhuga fyri arbeiðaramálum, og í ávísan mun fyri gongdini í Havnar Arbeiðsmannafelag sum hann hevur verið (er?) limur í (hava tíverri ikki atgongd til limalistan!) — er at fegnast um, og at hann er eitt slag av koyrli omanyvir okkum sum manna nevnd felagsins, er ikki at forkasta!

Jóanes hugleiðir um fakfelagsviðurskifti her heima og í Svøríki í 70´unum og 80´unum, og vísir á, hvussu afturhaldskroppar (eisini her hjá okkum) altíð standa fúsir at stuðla har, ein ikki hevði væntað (í veruleikanum væntaði man tað, men tað vísir seg at koma óvart á hvørja ferð — vit eru í botn og grund so góðtrúgvin).

**Broyting?**

Hann setir spurnartekin við um fakfeløgini eru broytt hesi seinastu 20-30 árini. Í veruleikanum, nei! Karmarnir eru nakað broyttir, men innihaldið er hitt sama. Hin spurningin, ein eigur at seta í hesum sambandi er: er hugburður arbeiðsmansins broyttur í hesum tíðarbili? Hava teir veruliga hug og dirvi at bøta um viðurskifti síni? Eftir teirra vali av limum í nevndir kann ein fáa tað fatan, at tey vilja hava ein formann, forkvinnu sum til tíðir torir at siga onkur orð sum virka skilagóð kanska enntá áloypandi, eggjandi meðan teir "meinigu" nevndarlimirnir skulu halda blátt kjaft og ikki provokera arbeiðsgevarar, bankar, tryggingarfeløg, myndugleikar.

Vóru við í samráðingunum fyri tveimum árum síðan har ymisk høvuðsmál vóru avtalaði millum feløgini undan samráðingunum. Tá ið til stykkis kom og tey feløgini vit vóru saman við, høvdu fingið tað (lítla) tey vóru komin eftir, varð okkara, tað er HAF´s, høvuðskrav sum var: sama yvirtíðarsatsir sum tey alment løntu, slept og tveitt á bláman!

**Seming?**

Hetta bar í sær eitt semingsuppskot, og góðtóku tveir limir frá Havnar Arbeiðsmannafelag (tríggir atkvøddu ímóti), fimm frá Klaksvíkar Arabeiðsmannafelag og fimm frá Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, uppskotið, so tann einmælta góðkenningin ein fekk boð um í fjølmiðlunum aftaná var ikki meira einmælt enn tað! Vera vit við til eitt komandi samráðingarumfar, fara vit at virka fyri at umboðan okkara verður avgerandi breiðari enn handan, og avtalur meira bindandi!

Tað verður ov drúgført at fara longur í hesum viðmerkingum, so lat okkum fara til tað vit av fyrstan tíð ætlaði at siga nakað um.

**Uppritið**

Jóanes hevur sæð eitt upprit sum undrar hann nakað. Fyrst var tað staðið, har tað er hongt upp, síðan orðaljóðið og lat okkum gloyma staðið í løtuni og taka orðaljóðið sum sigur frá, hvat Jóhan Carl fer at virka fyri sum (hvør veit — kanska komandi) formaður í Havnar Arbeiðsmannafelags:

- At gera felagið opnari og meira virkið úteftir, soleiðis at limir felagsins fáa størri kunnleika til og ávirkan á felagsarbeiðið
- Útbúgving av álitis- og trygdarumboðum okkara og betri kunning til limirnar sum heild um ábyrgd og ikki minst — rættindi
- Virkast skal í nógv størri mun til at skattingin av síðst forvunnu krónunum skal lækkast, eins og pensiónsgjaldið skal upp aftur

Vit báðir, Eyðbjørn og Jóhan Carl, settu skrivið upp og duga at síggja at Jóanes hevur grein í sínum máli um, at hetta kann misskiljast.

Tað sum gongur fram, og sum vit ætlaðu at staðfesta er at gjaldið skal "upp aftur", ikki upp av nýggjum ella hækkast! Talan er her um *útgjaldið* til eftirlønarmóttakararnar sum var 3.500 kr. og sum varð sett niður á 2.800 um mánaðin, skal fáast upp aftur. Hóast eftirløntu limir okkara eru takksamir fyri hetta ískoytið, so lítið tað kann tykjast, so má endamál nevndarinnar vera at hava eyguni eftir eftirlønargrunninum og at síggja til at hetta gjald altíð liggur so høgt, sum til ber. Myndugleikar okkara (uttan mun til, hvønn politiskan flokk vit tala um) hava hildið tað vera sína uppgávu at bøta um hjá øðrum í samfelagnum, men ikki hjá arbeiðarafjøldini! At hetta átti at verið ein sjálvsøgd landsuppgáva vita vit, men vit vita eisini at teir skíta á tað! Tí mugu vit vera á varðhaldi við tí ávirkan, vit hava!

**Eftirlønargrunnurin**

Sum nevndarlimir í HAF fingu vit ár um ár at vita, at grunnurin livdi eitt sunt og normalt liv; bleiv meira og meira bótaførur, hóast hann enn ikki lúkaði tær endaligu treytirnar at vera sjálvberandi.

Men aftaná eina Danmarkarferð í ár 2000 hjá táverandi formanninum og Monrad Kjelnæs, skrivara felagsins, (sum nevnd HAF ikki visti minsta vet um og sum Tryggingarsambandið vistnokk rindaði), fingu nevndarlimir HAF´s knívin á barkan og boð um at so og so nógvar mió, sum felagið átti á bók, máttu fara til at styrkja grunnin, ella varð hann settur undir umsiting. Hetta førdi til lækkingina.

Eitt sum fyri okkum tykist sera løgið er at hóast tryggingarmál eru — og vóru eisini tá — føroyskt sermál, so var tað danska tryggingareftirlitið boðsent í tí málinum. Ein kann spyrja seg sjálvan: var hetta "umbiðið arbeiði?"

**Tøma kassan?**

Agitatiónin hjá mótstøðumonnum Jóhan Carls gongur út uppá at hann ætlar at tøma kassan hjá Havnar Arbeiðsmannafelag, og tað er ikki bert sum at siga tað!

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur eina lóg sum — hóast avoldað — setir avmarkingar fyri hvussu peningaviðurskiftini skulu viðfarast so har haldia vit, at limir felagsins við eini tilvitandi nevnd skulu kenna seg tryggar.

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur milliónir liggjandi óvirknar — omanfyrinevnda lóg noktar okkum at fara inn í tøl — sum vit eiga at fáa virknar; ikki til at oysa út til vinstru og høgru, men til at koma eigarunum — t.e. okkara limum, t.d. pensjónistum og virkandi limum til góða! Men eitt fara vit hóast alt at avdúka; at rentur sum vit fáa av hesum milliónum í dag liggja rættiliga nær niður ímóti null og nix! Eisini skulu komandi limir kenna seg vísar í, at teirra áhugamál koma at liggja fremst fyri.

**Mangt liggur á láni,**

og okkara limir — um nakar — vita at vit faa einki uttan at tað kostar. Okkara uppgáva sum — hvør veit — komandi nevndarlimir í nevnd Havnar Arbeiðsmannafelagi, verður limanna vegna at syrgja fyri at teir koma at fáa sum minst av meirútreiðslum. At vit kanska eftir komandi lønarsamráðigar fyri einaferðs skuld fáa eina lønarhækkan sum sæst aftur í tí dagliga.

Felagshúsið hevur ligið í órøkt í 40 ár (t.e. síðan tað var bygt), og síðst vit fingu at vita, kemur tað at kosta nógvar milliónir (uml. 15) at seta tey í nýtiligan stand aftur. Hvør segði, at einki liggur á láni?

So, Jóanes, uttan mun til hvør fer at manna nevnd Havnar Arbeiðsmannsfelags eftir aðalfundin, vilja vit staðiliga at heita á teg: Vælsignaður — ver framhaldandi koyril, lurkur, reyvsparkari felagsins.






# Bjarni Bjarnason í nevnd fyri Norðoyartunnil

TÍÐINDASKRIV

Á eykaaðalfundi í p/f Norðoyatunlinum tann 29. januar 2003 er Bjarni Askham Bjarnason valdur í nevndina fyri Klæmint Weihe, ið hevur sagt seg úr nevndini. Hinir nevndarlimirnir eru Bergur í Garði, Jens Kári Vilhelm, Heri M. Hammer og Oyvindur Brimnes.

Nevndin hevur skipað seg við Bergi í Garði sum formanni og Jens Kára Vilhelm sum næstformanni.



# Kríggj er ikki loysnin

**– Skalt tú arbeiða fyri friðið, so mást tú arbeiða móti fátækaradømi og elindigheit, sigur Manijeh Elsa Modi, sum er ein av røðarunum á fólkafundinum fyri friði á Vaglinum leygardagin**

FUNDUR

*Heri á Rógvi*

Leygardagin kl. 14.30 verður skipað fyri fólkafundi fyri friði við. Yvirskriftin í tíðindaskrivi frá fyrireikarunum hevur verið áheitanin um heldur at byggja brýr enn at blaka bumbur.

Tað er Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin, sum, saman við ungmannafeløgunum hjá flokkunum, skipa fyri fundinum.

– Hetta tiltakið hevur einki við partapoltikk at gera. Vit vilja bert vísa okkara humanistiska støðu, sigur Rúni Nielsen, formaður í Unga Tjóðveldinum.

Í tíðindaskrivi hava fyrireikararnir víst á, at frælsi og fólkaræði í Irak bert kann vinnast við friðarligum, politiskum amboðum – ikki við vápnum.

Fyrireikararnir vísa greitt á, at teir vísa ikki minsta samhuga við Saddam Hussein, men teir taka heldur ikki undir við kríggi.

– Vit vera oftani gloymd her í Norðuratlandshavi, men vit ynskja at vísa eina felagsstøðu útfrá humanistiska sjónarmiðinum, sigur Rúni Nielsen.

Tiltakið byrjar við friðargongu úr Kommunuskúlagarðinum kl. 14.15, og sjálvur fundurin verður kl. 14.30.

Rúni Nielsen sigur, at áhugin undan tiltakinum hevur verið stórur, og hann vónar, at nógv fólk møta upp til fólkafund á Vaglinum.

**Ikki besta loysnin**

Røðararnir á fundinum vera Jóannes Nielsen, Rói Patursson, Marjun Bøk og Manijeh Elsa Modi. Hendan síðst nevnda eru tað óivað ikki nógv, sum kenna navni á.

Manijeh er hálv indisk, men hevur búð í Føroyum síðani ellivu ára aldur, og hon tosar og sær út sum ein og hvør annar føroyingur.

Hon er útbúgvin BA í búskaparfrøði og BA í datalogi. Í løtuni er hon undir úbúgving til at gerast cand.scient í datalogi. Hon starvast umframt lesturin á Hagstovu Føroya.

Røðararnir hava fingið yvirskriftina at vita, men hava ikki fingið nakað álagt.

Eg fari at royna at halda mína røðu niðri á jørðini. Samstundis fara eg at royna at fyrihalda meg til teir stóru linjurnar /hava eitt breitt perspektiv, sigur Manijeh uttan tó at vilja siga heilt, hvat hon fer at siga fyri fjøldini leygardagin.

Hennarar sjónarmið er tað, at fátækaradømi og elendigheit er størsti trupulleikin í heiminum.



*Manijeh Elsa Modi verður ein av røðarunum á fólkafundi fyri friði leygardagin. Hon heldur ikki, at kríggj er rætta loysnin upp á trupulleikan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Skalt tú arbeiða fyri friðið, so mást tú arbeiða móti fátækaradømi og elendigheit, sigur Manijeh Elsa Modi.

Sambært hennara sjónarmiðum eiga vit at hálsa um og, draga tey fátæku inn í okkara marknaðarbúskap.

Vit mugu handla beinleiðis við teimum allar fátækastu - undir marknaðartreytum.

Tað er neyðugt, at gjørt verður sum í Bangladesh, at bankar veita sokallaði mikro lán til fátæku fólkini.

Fortreytin fyri øllum hesum er, búskaparlig álit á teimum. Royndirnar frá Bangladesh vísa, at skipar man fyri á skinsaman hátt, eru tey fátæku betur til at gjalda lánini aftur, enn tey sokallaðu ríku, sigur Manijeh.

Hon heldur ikki, at verandi menningarhjálpt er rætta mátin at betra um støðuna.

Orsøkin er tann, at tann fyrst eingin trygd fyri, at hjálpin veruliga kemur teimum, sum tørva hana, til góðar.

At hjálpa fátæku fólkum við skilagóðum livikorum er langt frá hugskotinum um kríggj.

Saddam og hansara stýri er eitt diktatur. Tað er ikki undirtøka fyri hesum millum fólkið í Irak og heldur ikki nakra aðrastaðni. Hann er ein trupulleiki. Men spurningurin er, um hetta nú er rætta loysnin, at leypa á við maktð, sigur Manijeh.

Hon heldur, at USA hevur brúk fyri einum máli at rætta seg ímóti, og hetta er í hesum førinum Irak.

Hópoyðingarvápn eru ikki eitt ókent fyribrigdi. Vit vita, at onnur lond eisini hava hesi vápn, men allíkavæl verður alt rættað móti Irak, sigur Manijeh.

# Leiðaraskifti og umskipan á deildunum hjá Føroya Sparikassa í Eysturoy

TÍÐINDASKRIV

Deildarbygnaðurin hjá Føroya Sparikassa í Eysturoy verður við virknaði frá 1. februar 2003 broyttur soleiðis, at deildin í Runavík verður høvuðsdeild fyri allar deildirnar í Eysturoynni. Hetta verður gjørt fyri at samskipa arbeiðið á deildunum betri og fyri best møguligt at gagnnýta tann sakkunnleika, sum er á deildini í Runavík, har serstøk vinnulívsdeild hevur verið síðani 2001.

Samstundis fer eitt leiðaraskifti fram í Runavík.

Tummas M. Jacobsen, sum tann 1. februar 2003 hevur virkað sum deildarleiðari í Runavík í 15 ár, hevur ynskt at royna nýggjar avbjóðingar í Føroya Sparikassa og fer framyvir at virka sum fulltrúi á Kredittdeildini í Tórshavn við ábyrgd av privatkundum.




Frá 1. februar 2003 er Jónleif Th. Jacobsen settur sum deildarleiðari fyri deildirnar í Eysturoy, og Kristine Ellingsgaard er sett sum varaleiðari fyri deildirnar í Eysturoy.

Bæði eru kend andlit í Sparikassanum. Jónleif er 45 ára gamal, er giftur og hevur eina dóttir og tveir synir. Hann hevur verið varaleiðari á deildini í Runavík síðani 1. mai 2000 við ábyrgd av vinnulívskundunum, og hevur áðrenn tað arbeitt í Føroya Banka í 25 ár. Kristine er 35 ára gomul, er gift og hevur tveir synir. Hon hevur verið deildarleiðari á deildunum í Fuglafirði og við Gøtugjógv síðani 1. august 2001. Kristine hevur lært í Føroya Sparikassa, og hevur arbeitt á deildunum í Fuglafirði og við Gøtugjógv síðani 1988.

Framyvir fara Jónleif og Kristine at virka sum eitt leiðslutoymi fyri allar deildirnar í oynni. Jónleif fer at hava yvirskipaðu leiðsluna og leiðsluna fyri vinnulívsdeildini í Runavík. Kristine fer at hava dagligu leiðsluna av privatkundadeildini í Runavík og yvirskipaðu leiðsluna av hinum deildunum í Eysturoy.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 01.02. kl. 18:30
Leygardagin 01.02. kl. 23:15
Sunnudagin 02.02. kl. 18:30
Sunnudagin 02.02. kl. 20:30




Leygardagin 01.02. kl. 20:30
Sunnudagin 02.02. kl. 22:30




Leygardagin 01.02. kl. 21:00
Leygardagin 01.02. kl. 23:30
Sunnudagin 02.02. kl. 19:00




Leygardagin 01.02. kl. 17:30
Sunnudagin 02.02. kl. 21:30

**KOMANDI FILMAR**




**Heimsfrumsýning**
**Fríggjadagin 07.02.**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 07.02.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**